## Henry kláraði læknaroyndina

Thierry Henry er nú alment Barcelona-leikari, eftir at hann í gjár kláraði ta obligatorisku læknaroyndina,. Læknin hjá Barcelona, Richard Prune, sigur, at alt er í lagi hjá Henry, og har er einki sum tíðir uppá, at Henry ikki kann gerast ein partur av liðnum hjá Barcelona. Barcelona hevur goldið Arsenal 180 mió. kr. fyri sterka franska áleyparan, og Henry kemur afturat hópinum tann 21. juli, tá spanska stórfelagið byrjar fyrireikingarnar til komandi kappingarár.




## Hingis slapp við skrekkinum

Sveisiska tennisstjørnan, Martina Hingis, slapp við skrekkinum í fyrstu rundu av stóru Wimbledon-kappingini í Tennis. Her møtti hon Wild-Card spælaranum, Naomi Cavaday, úr Onglandi, og fyrsta sett megnaði Cavaday at vinna. Í øðrum setti hevði Cavaday tríggjar dystarbóltar við støðuna 5-4, men so vendi Hingis dystinum. Hon vann hesar tríggjar bóltarnar, og næstu tvey spølini í øðrum setti, sum endaði 7-5. Í triðja setti vann Hingis 6-0, og gav sostatt Cavaday eitt egg.

## Jarnbardur aftur fremst

**Tað tók sína tíð hjá kvinnunum á Jarnbardi at sleppa leysar av Kollfirðingi, men tá tær fyrst vóru leysar, var eingin ivi um sigurin**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kvinnurnar á Jarnbardi hava verið í serflokki hjá 6-mannaførum við kvinnum í ár. Tær hava vunnið trygt á bæði Norðoyastevnuni og á Sundalagsstevnuni, og leygardagin vóru tær eisini stórfavorittar at vinna róðurin á Jóansøku.

Tær fingu eisini bestu byrjanina í kappingini ímóti Kollfirðingi og Smyrli, og ikki gekk long tíð, áðrenn tær vóru knappa bátslongd framman fyri Kollfirðing. Tað tók tó eina løtu hjá Jarnbardi at blíva leysar av Kollfirðingi, men tá tær fyrst vóru leysar, var slett eingin ivi um úrslitið.

Jarnbardur bara økti um munin inn eftir fjørðinum, og tá bátarnir komu á mál, var Jarnbardur knappar tríggjar bátslongdir framman fyri Kollfirðing, meðan Smyril var uppaftur sjey ella átta bátslongdir aftari á triðja plássi.

Við sigrinum er Jarnbardur enn ósigraður í kappingini hjá 6-mannaførum við kvinnum, men Kollfirðingur er tó blivin betri og betri fyri hvørja stevnu.

# Sundabáturin punkteraði stevnuhýrin




*Heima áskoðararnir høvdu góðar vónir til Tvørabátin í 6-mannaførum við monnum, men Sundabáturin oyðilegði ein part av stevnuhýrinum við at vinna henda róður í harðari kapping við júst Tvørabátin*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*

**Spentu heima áskoðararnir á Tvøroyri høvdu stórar vónir til teirra 6-mannafar, Tvørabátin, sum hevði vunnið róðurin á Sundalagsstevnuni, men hesum vónunum steðgaði Sundabáturin, tá teir avgjørdu róðurin við einum sera góðum endaspurti**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hetta kappingarárið í kappróðri kann ikki sigast at hava verið serliga spennandi fyrstu tveir róðrarnar, sum hava verið á Norðoyastevnu í Klaksvík og á Sundalagsstevnu í Hvalvík og Streymnesi. Í fleiri av bátaflokkunum hava tryggir vinnarar verið báðar róðrarnar, og tí hevur tað bert verið í ávísum bátaflokkum, at spenningur hevur verið í.

Hjá 6-mannaførum við monnum hava serliga Sundabáturin og Tvørabáturin gjørt kappingini spennandi í ár. Í fyrsta róðrinum megnaði Sundabáturin at vinna á heimasjógvi í Klaksvík, men tvær vikur seinni svaraði Tvørabáturin aftur. Tá vunnu teir næsta róðurin á árinum á Sundalagsstevnu, og hetta var eisini fyrsti kappróðrarsigurin hjá monnunum av Tvøroyri, síðani Suðringur vann á Vestanstevnu í 1991.

Í triðja róðrinum um vikuskiftið var aftur lagt upp til harða kapping millum serliga hesar báðar bátarnar, og nú hevði Tvørabáturin møguleika at leggja seg á odda í FM-kappingini við einum sigri á heimasjógvi.

### Púra javnt allan vegin

Tá ið startdómarin skeyt róðurin í gongd hjá 6-mannaførunum, vóru tað eisini nevniliga Sundabáturin og Tvørabáturin, sum fingu bestu byrjanina. Teir báðar fyrstu róðrarnar hevur Strálan eisini verið væl við í kappingini at kalla allan vegin, men á Jóansøkuni fingu teir eina keðiliga byrjan, sum gjørdi, at teir fóru langt aftur um Sundabátin og Tvørabátin beinanvegin, og tí komu teir ongan tíð við í kappingina um fyrsta plássið.

Sjálvt um Strálan ikki ordiliga kom við í kappingina um sigurin á Jóansøkuni, so megnaðu Sundabáturin og Tvørabáturin at gera róðurin sera. Mest sum eingin munur var á bátunum, sum fóru stavn um stavn inn eftir fjørðinum. Onkuntíð var Sundabáturin frammanfyri, og næstu løtuna var Tvørabáturin omaná.

### Endaspurturin avgjørdi róðurin

Tá ið bátarnir byrjaðu at nærkast teimum nógvu áskoðarunum, sum stóðu á keiini, var enn eingin munur á, men endaspurturin bleiv avgerandi henda dagin.

Sundabáturin hevur altíð verið meir ella minni kendur fyri sín sera góða endaspurt, og hesin kom rættiliga til sjóndar á Jóansøku leygardagin. Tá bátarnir fóru undir endaspurtin var púra javnt millum Sundabátin og Tvørabátin, men fyri hvørt tak seinastu 150 metrarnar fór Sundabáturin frá Tvørabátinum.

Tá bátarnar komu á mál var ein hálv bátslongd á muni, og sostatt gjørdist greitt, at Sundabáturin fekk sín næsta sigur á árinum, meðan Tvørabáturin mátti noyðast við einum silvurheiðursmerki á heimasjógvi.

Strálan, sum lá aftast ella næst aftast í byrjanini, róði seg rættiliga upp seinastu 1000 metrarnar, og endaði á einum triðja plássi.

Við sigrinum á Tvøroyri hevur Sundabáturin nú lagt seg trý stig fram um Tvørabátin í FM-stríðnum. Hetta ger, at menninir umborð á Tvørabátinum helst skulu vinna næstu stevnuna, sum verður í Fuglafirði komandi leygardag.

Um Strálan fær eina góða byrjan á Varmakeldu, kunnu bæði Sundabáturin og Tvørabáturin eisini vænta sær harða kapping frá teimum.